

# Húskallar

Tað munnu verða fáir bólkar í Føroyum, sum hava klárað at gjørt so nógv um seg sum Húskallar við bara at geva eina útgávu út og spæla nakrar fáar konsertir. Húskallar við kjarnuni úr Leirvík góvu í 1991 eitt kassettubond út, teir spældu nakrar fáar sangir, og tað var tað.

Men tað, sum kundi verið leyst og liðugt – gloymt eftir einari lítlari løtu – gjørdist til eina legendariska útgávu í føroyskum tónleiki. Sangirnir kundi eingin jarða, hóast bólkurin ongantíð fekk veruliga luft undir veingirnar sum konsertbólkur, og hesi mongu árini, síðani útgávuna hjá Húskallum, hava sangir sum Bóndin Hungrar (Knarvakotið), Ria, Hans Ansgar og Aftur Nú verið tráspældir í føroyskum útvarpi.

Og nú skal tað so verða – tað stóra comebackið. Húskallar hava funnið saman aftur, teir eru farnir í venjingarhølini, og á Summar Festivalinum royna teir enn einaferð at gera comeback.

Gerið tykkum til reiðar til ársins kultframførslu!

# Eyðun & Terji

**Ein duo uttan sín líka í føroyskum tónleiki. Frálíkir sangarar, framúr sangskrivarar og sera dugnaligir á palli. Eyðun Nolsøe og Terji Rasmussen taka enn eitt tørn á Summar Festivalinum, og tey, sum hava verið við til undanfarnu festivalar, vita, at hetta er nakað av tí besta, sum kann upplivast á festivalinum.**

**Teir fara at syngja og spæla sínar bestu sangir, og tað eru sanniliga sangir, ið fólk kenna aftur. Eyðun og Terji hava skrivað sangir sum 80'ini, Dansa, Eros, Hvønn Dag, Eg flýggi til tónleikin, Nummar og nógvar, nógvar aðrar sangir.**

**Teir hava drúgvar royndir sum tónleikarar á palli, og sum duo verða teir ikki tiknir. Komið og syngið við til nøkur av størstu hittunum í føroyskum popptónleiki!**





# Masterclass

**Frálíkt høvi verður nú at uppliva tónleikaligt talkshow við dananum Lars Danielsson, sum seinastu umleið 30 árini hevur verið millum mest umbidnu bassleikarar í norðurlondum. Lars fer at greiða frá um bæði og eitt og annað, sum tónleikarar kunnu koma út fyri. Hann fer at geva góð ráð um praktisk viðurskifti, og fólk fáa sjálvsagt møguleikan at seta honum spurningar.**

**Lars Danielsson hevur spælt saman við heimskendum tónleikarum sum Mary J. Blige, Des' Ree, Eagle-Eye Cherry, Rick Astley umframt einari langari røð av kendum donskum bólkum.**

**Masterclass við Lars Danielsson verður í Skansastovu í Havn mikukvøldið 6. aug. kl. 19:00.**

**Atgongumerki fáast við dyrnar ½ tíma áðrenn tiltakið.**

# Sølva Ford & SALT

**Sølva Ford hevur verið virkin í føroyskum tónleiki í nógv ár. Kendasti sangurin, sum hon hevur sungið, man vera Troystartámið, sum hevur verið ein ordans slagari.**

**Nú gongur Sølva nýggjar leiðir. Hon hevur givið fløguna Á Kærleikans Gøtum út, og á fløguni er erligur og ektaður countrypoppur. Sølva viðgongur, at hennara lív hevur ikki bara verið lætt, men nú hevur endurfunnð Gud og hevur eitt gott lív.**

**- Tað er mín kristintrúgv, sum á ein ella annan hátt hevur hjálpt mær gjøgnum lívið og teir trupulleikar, eg havi møtt á vegnum. Men tað er kortini bara hálvur sannleiki, tí um tað hevur verið Guðs vilji og hansara máti at hjálpt mær, tá ringast stóð til, veit eg ikki, men tá eg átti míni tvey børn, gjørdust tey eitt vendipunkt í lívinum, segði Sølva Ford í blaðsamrøðu við Sosialin herfyri.**

**Á Summar Festivalinum fer Sølva Ford at framføra sangir av fløguni og aðrar sangir, og hon fær góða hjálp. Gospelbólkurin SALT fer nevniliga at stuðla henni við kórsangi.**

